# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Minnilutasamgonga roynast

**Tað ber til við minnilutasamgongum í londunum rundan um okkum, hví skal tað so ikki bera til hjá okkum, sigur løgmaður til politisku støðuna, nú teir stóru andstøðuflokkarnir ikki vilja koma upp í samgonguna**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Løgmaður heldur fram í enari minnilutasamgongu við Sjálvstýrisflokkinum sum stuðulsflokki*

Løgmaður hevur í morgun staðfest, at ikki ber til at skipa eina breiða samgongu við øðrum av stóru andstøðuflokkunum.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, hevði fundir við Sambandsflokkin mánadagin og við Fólkaflokkin týsdagin, men bæði Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, og Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, gjørdu greitt, at teir ynsktu ikki at gerast partur av samgonguni. Báðir gjørdu greitt, at byrjast skuldi við blonkum pappíri.

Eftir at hava fundast um støðuna gjørdi løgmaður av, at royna eina minnilutasamgongu við Sjálvstýrisflokkinum sum stuðulsflokki.

Tað er eingin loyna, at tað hava verið nógvar ósemjur í samgonguni, og Gerhard Lognberg hevur meldað seg úr tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum. Hvussu støðan er við Heina O. Heinesen er eitt sindur ógreitt, men løgmaður roknar við, at hann er partur av Tjóðveldi og harvið verður við í valbólkinum hjá samgonguni.

- Seinast eg visti var Gerhard Lognberg ikki partur av valbólkinum hjá samgonguni, og tað hevur eina reint matematiska ávirkan á talið av nevndarsessum, sigur løgmaður.

## Spennandi avbjóðing

Sum ført hevur verið fram fleiri ferðir, er ein minnilutasamgonga ikki roynd í Føroyum áður. Men Jóannes Eidesgaard sigur, at tá tað ber til í londunum uttan um okkum, so er eingin orsøk til, at tað ikki eisini skal kunna bera til í Føroyum.

- Tað liggur okkum nú á hjarta, at fáa minnilutasamgonguna upp at standa og vísa, at hon er arbeiðsfør í verki, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Hann sigur, at tað hevur veirð fokuserað ógvuliga nóg upp á ósemjur, og róð verður upp undir, at einki er fingið av skaqfti hjá hesari samgonguni.

- Men hetta er ikki rætt. Vit hava avgreitt útlendingamálið, sum er eitt risastórt mál. Og vit hava avgreitt fleri onnur mál, so at siga, at einki er komið av skafti, er ikki rætt, sigur løgmaður.

Hann er sannførdur um, at talan verður um eina spennandi avbjóðing, sum liggur fyri framman.

- Hetta fer at krevja meiri av øllum, bæði landsstýrisfólkum og tinglimum. Men tað fer samstundis av merkja, at øl verða meiri inndrigin í málini og í politisku viðgerðina, sigur løgmaður.

Løgmaður fer nú at heita á tingformannin um sum skjótast at kalla tingið saman til tess at fáa nevndirnar valdar av nýggjum.

# Ikki greitt hvat hendi á Argjum

**Sterka spreingingin á Hamrinum á Argjum í gjár kundi ført nógv størri skaða við sær**

SPREINGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vit vita ikki enn, hvat tað var sum hendi á Argjum í gjárkvøldið.

Tað sigur Niclas Joensen frá Articon, sum stendur fyri arbeiðinum at grava út fyri nýggjum skúla á Hamrinum á Argjum.

Tað var um hálvgum seks tíðina í gjárkvøldið, at sterka spreingingin hendi, sum sendi hampiliga stórar steinar fleiri hundrað metrar oman í býin. Fleiri hús fingu snuddir, men tíbetur hendi eingin mannskaði.

Articon fer nú at kanna, hvat tað var sum hendi á Argjum í gjárkvøldið.



*Spreingingin á Argjum í gjárkvøldið var óvanliga sterk*
*Mynd: Jan Egholm*